Framhald av síðu 10

við minstulønarskipanini árliga reiðarunum ein rættuliga stóra milliónaupphædd, sum í veruleikanum er ein stuðul til fiskivinnuna.

Vit unna væl fiskimonnunum hesa inntøkutrygd teirra, men tað kann ikki vera rætt, at okkara politikarar als ikki vilja skapa karmar fyri arbeiðsplássum í fiskivinnuni á landi, samstundis sum tíggjutals milliónir verða brúktar til at stuðla føroysku reiðarunum.

Enn meira skilaleyst er hetta, um hesir somu politikarar vilja góðtaka ella enntá stuðla undir, at reiðararnir avreiða fiskin uttanlands, hóast talan er um fisk, sum er veiddur við fíggjarligum stuðli úr landskassanum.

## Tíðin er ikki búgvin til at einskilja Føroya Fiskavirking

Sum støðan er nú við tekin um kreppu í samfelag okkara, er tíðin ikki búgvin til at einskilja Føroya Fiskavirking.

Greitt er, at um ein einskilj-ing skal fara fram, so eigur hetta ikki at verða gjørt í einari tíð, har útlit eru til alsamt minkandi arbeiði á landi, og vit vilja tí heita á landsins myndugleikar um at taka stig til, at eingin einskiljing fer fram, fyrr enn støðan í samfelagnum talar fyri hesum.

Um Landsstýrið skapar møguleikar fyri at fiskur fer ótilvirkaður av landinum, so er tað skyldan hjá landsins myndugleikum at skapa møguleika fyri alternativum arbeiðsplássum.

Tað tykist, sum at landsins myndugleikar bert sita hendur í favn, nú útlit eru til at alt meira av føroyska fiskatilfeinginum fer av landinum, og tá landsins myndugleikar soleiðis beinleiðis ella óbeinleiðis góðtaka hesa støðu og í ávísum førum beinleiðis stuðla undir hesari gongd, so er tað skyldan hjá okkara fólkavaldu politikarum at melda greitt út, hvat ætlanin so er við teimum arbeiðsplássum, sum tørvur verður á, nú verandi arbeiðspláss í fiskivinnuni á landi alsamt fækka.

Tað ber ikki til at politiski myndugleikin, sum hevur ábyrgdina av samfelag okkara, stuðlar einari gongd, har grundarlagið fyri hundraðtals arbeiðsplássum verða tikin burtur og samstundis einki ger fyri at skapa hesum somu borgarum nýggj arbeiðspláss.

Fyri at fáa greiðu á frammanfyri nevndu viðurskiftum vilja vit, sum frammanfyri nevnt, skjótast til ber eftir summarfrítíðina hava fund við landsins myndugleikar fyri at fáa greiðu á, um politiski myndugleikin hevur nakra ætlan yvirhøvur viðvíkjandi óhepnu gongdini, har alsamt størri partur av fiski okkara fer ótilvirkaður av landinum.

Um politiski myndugleikin einki ætlar at gera fyri at forða fyri, at størri partur av fiskatilfeinginum fer ótilvirkað av landinum, so er neyðugt at fáa greitt at vita, hvørji stig politikararnir ætla at taka, fyri at skapa karmar fyri øðrum arbeiðsplássum, í staðin fyri tey, sum verða avreidd av landinum.

Vinaliga boða okkum skrivliga frá, nær nevndi fundur kann verða hildin.

Av tí at talan er eitt álvsarsmál, sum hevur áhuga millum allar føroyingar, so hava vit sent fjølmiðlunum avrit av hesum skrivi okkara.

**Ingeborg Vinther**
**Vegna feløgini**


HOTEL VÁGAR *** THE AIRPORT HOTEL

*Tann stóra føroyska buffetin á Vestanstevnu*

*- royn føroyskan mat og mentan*
*fríggjakvøldið, leygardagin frá kl. 12.00 ella sunnudagin frá kl. 12.00*

**Vit bjóða eina føroyska buffet við meira enn 30 ymiskum heitum og køldum fiska- og kjøtrættum.**

**Chefkokkurin bjóðar m.a.:**

**Kalt**
*Turt lambstjógv*
*Turt tvøst*
*Saltað spik*
*Turran fisk*
*Seyðarhøvd*
*Saltað lambstjógv*
*Øður*
*Ymiskir fiska- og skeljadjóraserrættir*

**Heitt**
*Grindagrýta*
*Lambaryggur*
*Oksaháryggur*
*Dunnubringa*
*Reyðtunga*
*Kalvi*
*Laksur*
*Kongafiskur*
*Saltfiskur*

**Omaná**
*Surprise*



*fyri hvønn* ***180,-***

**Føroyskur dansur:**
*Leygarkvøldið uml. kl. 20.30 verður skipað fyri føroyskum dansi.*
*Eisini verður greitt frá um føroyska mentan.*



team85

HOTEL VÁGAR
FLOGFELAG FØROYA · SØRVÁGUR · TEL 33 29 55 · FAX 33 23 10 · T-Postur: hotel@ff.fo



P/F ALMA MASKINVERKSTAÐUR & SMIÐJA

**Neyðventilatión / flytan av luft - Vortex**
Høgt trykk (560 Pa) og 3600 m3 um tíman.
Slanga kann setast til (305 mm).
Kann millum annað brúkast til ventilatión -
- aftaná eldsløkking.
- at turka bygningar.
- tá arbeitt verður í tangum.
- tá arbeitt verður við vandamiklum evnum.
Slanga til Vortex: 7,6 mtr. Kr. 4.750,- við mvg.



**Á Hjalla 15 – Boks 1338 – FO 110 Tórshavn**
**Tlf. 31 58 90 – Fax. 31 35 00 – mail: henrik@alma.fo**

Kr. 7.350,- við mvg.



**LEYST STARV**

SsangYong
www.kollsker.com

**Bilverkstaðið v/H.J. Kollsker Sp/f søkir eftir starvsfólki at byrja 1. september 2005.**

**Arbeiðsuppgávurnar verða:**
· at sýna bilar
· bíleggja eykalutir og uppfylging av hesum
· kundamóttøka
· umvæling av skaðum

**Førleikakrøv:**
· royndir innan Autotaksskipanina
· plátusmiður ella hollar royndir innan umvæling av bilum
· fyrikomandi, álitandi, arbeiðssamur og fram um alt vælgjørdur
· fyrimunur um tú kanst hava fleiri bóltar í luftini í senn.

Starvið verður lønt eftir samráðing.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan 1. august 2005

Bilverkstaðið v/H.J. Kollsker Sp/f · Á Hjalla
Tel +298 31 10 13 · Fax +298 32 10 15
**BILVERKSTAÐIÐ**

*Bilverkstaðið v/H.J. Kollsker er eitt av størstu plátuverkstøðunum í Føroyum, og er í støðugari menning. Verkstaðið umvælir øll bilmerki og selir og umboðar jeeparnar SsangYong í Føroyum*



# Havnar Bio

kall




**Hostage** *FRUMSÝNING*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 15.07 | kl. 21.00 | kl. 23.15 |
| Leygardag | 16.07 | kl. 21.00 | kl. 23.15 |
| Sunnudag | 17.07 | kl. 21.00 | kl. 23.15 |




**Bøllebob og Smukke Sally** *FRUMSÝNING*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 15.07 | kl. 17.00 | kl. 19.00 |
| Leygardag | 16.07 | kl. 17.00 | kl. 19.00 |
| Sunnudag | 17.07 | kl. 17.00 | kl. 19.00 |




**Sahara**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 15.07 | kl. 22.45 |
| Leygardag | 16.07 | kl. 22.45 |
| Sunnudag | 17.07 | kl. 22.15 |




**War of the Worlds**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 15.07 | kl. 20.00 |
| Leygardag | 16.07 | kl. 20.00 |
| Sunnudag | 17.07 | kl. 19.30 |

**www.bio.fo • Telefon 31 19 56**

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**